

## Bilradio hósdagin kl. 16.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.10 eru samrøður við m.a. Olaf Mortensen um framtíðina hjá Lada í Føroyum, og við Henrik Kofod (myndin), sum fortelur um Volvo showbilin á Trucker Festivalinum Eisini er prát við Jackie Sachau frá Eysturoyar MC um EMC-Marathon.

# OWBILUR

FESTIVALUR

*Henrik Kofod, sum dagliga koyrir bilin*





*VW Passat CC er kosin ársins kvinnubilur 2010 í Danmark*

## Passat CC ársins kvinnubilur

Ein dómsnevnd við 20 kvinnum hevur kosið VW Passat CC sum "Kvindebilen 2010" í Danmark.

Í dómsnevndini vóru m.a. Margrethe Vestager, Andrea Elisabeth Rudolph, Pernille Rosendahl, Szhirley og Le Gammeltoft.

Tiltakið var í Keypmannahavn, har tilsamans 17 bilar kappaðust um at blíva ársins kvinnubilur í Danmark.

VW Passat CC fekk 250 stig av 300 møguligum. Nummar tvey og trý blivu ávikavist

Ford Kuga og Land-Rover Discovery .

## Nýggjur C4 í 2011



*Nýggi Citroën C4 kemur á marknaðin fyrst í 2011*

Citroën C4 verður fyrst í komandi ári avloystur av einum nýggjum bili við sama navni.

Talan verður um ein bil, sum er nakað størri enn tann C4, sum er á marknaðinum í dag.

Fyri at spara brennievni og CO2- útlát verður bilurin útgjørdur við t.d. nýggjastu stop/start-tøknini og Michelin Energy dekkum við sera lágari rullimótstøðu. Bilurin kemur at fáast við motorum við CO2 útláti heilt niður í 99 g/km.

Nýggi C4, sum verður gjørdur í Mulhouse í Fraklandi, kemur á marknaðin fyrst í 2011.